


**FINALUFAGNAÐUR**

*Kvinnurnar hjá Fleyr kundu saktans frøast eftir sigurin í Sørvági í gjár, tí hann merkir, at Fleyr kemur í FM-finaluna, har mótstøðuliðið verður Mjølnir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Mjølnir og Fleyr í finaluni

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Við sigri á SÍ í gjár, tryggjaði Fleyr sær pláss í FM-finaluni, sum verður ímóti Mjølni. Nú bara trý umfør eru eftir, kann SÍ bara úti í fjaru teorini fáa annað av liðunum aftur

**Hilmar Jan Hansen**

Alt talar fyri, at FM-finalan í Eikliguni hjá kvinnum í ár verður millum tvey av teimum gomlu feløgunum, ið fyrr plagdu at dominera kvinnuflogbóltin. Mjølnir og Fleyr eru ávikavist fimm og fýra stig framman fyri SÍ á triðja plássi, og við bert trimum dystum eftir, er SÍ-møguleikin burtur.

Dysturin, ið var avgerandi fyri hetta, var tann í Sørvági í gjár millum SÍ og Fleyr. Kravið til SÍ var, at liðið skuldi vinna, tí annars gjørdist gloppið ov langt upp til tey bæði liðini omanfyri. Tað sá eisini út til at byrja væl, tá SÍ vann fyrsta sett, men kortini rakk tað ikki.

Fleyr svaraði væl aftur og vann tey bæði næstu, ið vóru jøvn og spennandi, og í fjórða setti, tá síðsta útkall var hjá SÍ at svara aftur, gjørdust tølini enn meira sannførandi. Fleyr fekk tí veruliga víst, at liðið, ið ikki hevur megnað tingini seinnu árini, aftur er at finna heilt har frammi í fremstu røð.

SÍ, sum hevur verið føroyameistari trý ár á rað og greipuvinnari síðstu tvey árini, megnaði ikki at steðga havnarkvinnunum, ið ongantíð hava vunnið steypakappingina og annars skulu leita heilt aftur til 1997 eftir síðsta meistaraheitinum.

## Mjølnir enn á odda

Her verður so í øllum førum annar gullvinnari, tí samstundis gjørdi Mjølnir sína skyldu í dystinum ímóti TB í Trongisvági. Eisini her byrjaði heimaliðið betur og vann fyrsta settið, og hóast tey trý eftirfylgjandi vóru sera tøtt, vann Mjølnir tey øll. TB hevur ikki sæð út av tí stóra í síðstuni, men í gjár var øðrvísi, hóast tað er í seinna lagi.

Sigurin merkir, at klaksvíkskvinnur framvegis eru á odda við 20 stigum, eitt meira enn Fleyr, og um tann støðan heldur sær, verður tað Mjølnir, ið tryggjar sær heimadyst í einari møguligari triðju finalu, um føroyameistaraheitið ikki er avgjørt í teimum báðum fyrru finaludystunum.

Hinir báðir kvinnudystirnir, sum blivu spældir leygardagin, vóru innanhýsis uppgerðir millum fýra tey niðastu liðini. Ternan hevur sum uppflytari staðið seg sera væl og vann eisini ein sannførandi 3-0 sigur á KÍF, meðan ÍF, ið eitt skifti hevði hug at blanda seg upp í oddastríðið, vann 3-1 á Drátti.

Í kvøld klokkan 18 verður ein dystur í Sørvági, tá SÍ tekur ímóti TB. Skal SÍ gera sær nakrar allarsíðstu vónir um eina FM-finalu, er kravið í øllum førum ein sigur. Vinnur TB hinvegin, er tað eisini teoretiskt avgjørt, at FM-finalan hjá kvinnunum verður millum Mjølnir og Fleyr.

# Tað verða ÍF og Mjølnir

**MANSFLOGBÓLTUR** ÍF er langt síðani í FM-finaluni, men eftir dystirnar um vikuskiftið eydnaðist Mjølni at tryggja sær hitt finaluplássið

**Hilmar Jan Hansen**

Bæði fríggjakvøldið og í gjár vóru menninir hjá Mjølni í gongd, men í báðum førum fingu teir tað, teir komu eftir. Suðuri í Trongisvági vann Mjølnir fyrst 3-0 á TB, ið fylgdi væl við tey bæði fyrstu settini, men síðani dragnaði í tí triðja, og í gjár eydnaðist aftur Mjølni at gera ein vørr ímóti Fleyr.

Herfyri spældu Mjølnir og Fleyr ein spennandi fimmsettara, ið endaði 3-2 til Mjølnir. Tað merkti, at Fleyr var úti úr kappingini um finalupláss. Tá liðini aftur møttust í Badmintonhøllini í Klaksvík í gjár, vann Mjølnir sannførandi 3-1. Mjølnir tók fyrstu tvey settini, tapti triðja, men avgjørdi so.

Á Kambsdali tók ÍF ímóti SÍ, og hóast sørvingar vunnu annað sett og bitu frá sær í triðja, blivu teir avsmurdir í fyrsta og fjórða setti, so ÍF trygt kundi vinna 3-1. Hetta merkir eisini, at ÍF hevur tryggjað sær heimavøll í einari møguligari triðju finalu, tí ÍF er fimm stig betri enn Mjølnir og hevur spælt ein dyst minni.

Somuleiðis merkti hetta úrslitið, at menninir hjá SÍ ikki røkka í FM-finaluna í Eikliguni, tí teir eru fimm stig aftan fyri Mjølnir, men kunnu bara vinna fýra stig aftrat.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 18 | 16 | 2 | 51 | 11 | 40 | 20 |
| 2 | Fleyr | 18 | 15 | 3 | 48 | 18 | 30 | 19 |
| 3 | SÍ | 18 | 13 | 5 | 43 | 24 | 19 | 15 |
| 4 | ÍF | 18 | 10 | 8 | 35 | 30 | 5 | 12 |
| 5 | TB | 18 | 8 | 10 | 31 | 38 | -7 | 9 |
| 6 | Ternan | 18 | 5 | 13 | 20 | 43 | -23 | 7 |
| 7 | Dráttur | 18 | 2 | 16 | 22 | 50 | -28 | 3 |
| 8 | KÍF | 18 | 3 | 15 | 14 | 50 | -36 | 3 |

**Ternan-KÍF 3-0** (25-17, 25-21, 25-17)
**Dráttur-ÍF 1-3** (20-25, 25-22, 15-25, 19-25)
**TB-Mjølnir 1-3** (25-20, 23-25, 24-26, 22-25)
**SÍ-Fleyr 1-3** (25-22, 22-25, 23-25, 19-25)

## Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 18 | 16 | 2 | 50 | 15 | 35 | 22 |
| 2 | Mjølnir | 19 | 12 | 7 | 41 | 28 | 13 | 17 |
| 3 | SÍ | 18 | 10 | 8 | 40 | 27 | 13 | 12 |
| 4 | Fleyr | 17 | 7 | 10 | 25 | 36 | -11 | 9 |
| 5 | TB | 18 | 0 | 18 | 4 | 54 | -50 | 0 |

**TB-Mjølnir 0-3** (18-25, 18-25, 15-25)
**ÍF-SÍ 3-1** (25-13, 24-26, 25-21, 25-14)
**Mjølnir-Fleyr 3-1** (25-19, 25-23, 15-25, 25-21)

# Aftur á Eiði

**FLOGBÓLTUR** FM-finalurnar í flogbólti hjá bæði kvinnum og monnum verða aftur í ár spældar í ítróttarhøllini á Eiði

**Hilmar Jan Hansen**

FM-finalurnar í Eikligunum hjá kvinnum og monnum verða spældar síðsta vikuskifti í mars mánaði, og har møtast tey bæði liðini, ið enda á tveimum teimum ovastu plássunum í landskappingini. Finalurnar verða spældar sum best av trimum.

Leygardagurin 26. mars og sunnudagurin 27. mars eru settir av til endamálið, og spælt verður í ítróttarhøllini á Eiði, líka sum í fjør. Báðar dagarnar spæla kvinnurnar klokkan 14 og menninir klokkan 16.

Vinna liðini hvør sína finalu, verður triðja og avgerandi finalan spæld leygardagin 2. apríl, og tá hevur tað liðið heimavøll, ið endaði fremst í landskappingini.